## Skrúðgonga við øllum tilhoyri

Klaksvíkingum dáma væl at skipa fyri, og tað duga teir so sanniliga eisini. Tað fara teir at prógva enn einaferð, tá Norðoyastevnan verður sett sunnudagin kl. 14. Byrjað verður við skrúðgongu við Klaksvíkar Hornorkestri, skótum, ítróttarfólki og hestum. Alt fylgið møtir í Klaksvíksgarðinum, hagani gingið verður heim í Vágstún. Her fer Jógvan við Keldu, fyrrverandi borgarstjóri í Klaksvík at flyta fram røðu. Við hetta høvið spælir hornorkestrið eisini.



## Gongutúrur norður á Skarð

Tað eru ikki øll, ið hava eins góðan hug til tað formella og siðbundna. Her kemur Norðoya Gongufelag inn við einum hugnaligum og søguríkum túri til avtoftaðu bygdina Skarð, sum liggur á eystursíðuni á Kunoynni. Tað sum ger túrin áhugaverdan er, at søgukøn frásøgufólk verða við. Sagt verður, at hesin túrurin byrjar sunnudagin við Norðoya Kunningarstovu kl. 12:30 og varar íalt í einar seks tímar.

# Avsláttur við afturvirkandi kraft

### Klaksvíkar býráð hevur samtykt at seta í gildi systkinaavsláttur fyri foreldra-gjøldini á barna-ansingarøkinum galdandi frá 1. januar í ár



*Tað verður nú bíligari at hava børn í barnaansingini í Klaksvík* *(savnsmynd)*

Klaksvík: Avgerðin um avslátturin varð tikin, eftir at bæði Sosiala Nevnd og Fíggjarnevndin høvdu mælt til, at seta í gildi henda avslátturin sum verður upp á heili 15 prosent.

Systkinaavslátturin var upprunaliga samtyktur av undanfarna býráði sum partur av fíggjarætlanini fyri 2009. Tað vísti seg, at neyðugt var við einari útgreining av málinum, áðrenn tað kundi setast í verk. Tað er hetta, sum núsitandi býráð hevur gjørt.

Elsebeth Gunnleygsdóttur Hansen, forkvinna í Sosialu Nevnd upplýsir, at býráðið samtykti hetta málið einmælt.

- Eg fegnist um, at málið nú verður ført út í lívið. Júst hetta við avsláttrinum fyri systkin var eitt av fyrstu málunum, sum núsitandi býráðssamgonga vildi føra út í lívið, sigur hon við heimasíðuna hjá kommununi.

### Hækka avslátturin komandi ár

Á fundi í býráðnum í farnu viku samtykti býráðið somuleiðis, at avslátturin komandi ár skal hækka upp í 20 prosent.

Forkvinnan í Sosialu Nevnd upplýsir, at býráðið hevur samtykt, at umsitingin av skipanini verður útgreinað nærri, herundir hvussu avslátturin verður avgreiddur og útgoldin.

- Vónandi kann henda skipanin lætta um hjá familjum, sum hava fleiri enn eitt barn í barnaansing í Klaksvíkar Kommunu, sigur Elsebeth Gunnleygsdóttur Hansen.

*Snorri Brend*

## Norðoyastevnan longu byrjað

Hóast ársins fyrsta stevna í roynd og veru ikki verður sett fyrrenn sunnudagin, hava fyrstu tiltøkini longu verið.

Hetta hendi kl. 17:30 í gjár, tá skipað varð fyri talvkapping fyri børnum og ungum í Skákinum á Akursmørk.

Seinni um kvøldið varð skipað fyri snarkapping í talvi fyri vaksin á sama staði.

Aftur í dag eru nógv tiltøk á skránni, m.a. enn ein talvkapping í Vágstúni ella á sama staði sum hóskvøldið.

Av tiltøkum í kvøld kann nevnast tað sum KFUM & K-skótarnir skipa fyri. Talan er um eitt kondibingo við café. Sagt verður, at byrjað verður kl. 19 uttanfyri felagsbygningin og at endað verður umleið kl. 21.

## Øðrvísi tónleikaferð við Jens Marna

Fríggjakvøldið verður Leikalund karmur um fyrstu konsertina á fyrstu summarstevnuni í 2009.

Kl. 21 fer nevniliga kendi tónleikarin úr Kollafirði, Jens Marni Hansen at stíga á pallin í Spaniastovu í elstu handilshúsinum í Klaksvík.

Hann hevur áður hitað upp fyri heimskenda tónleikaran, Bryan Adams, tá hesin vitjaði í Havn í fjør. Á Norðoyastevnu í ár fer hann at hita norðoyingar og stevnugestirnar upp við frálíka tónleiki sínum.

Jens Marni fer í kvøld at framføra løg av fløguni "The right way" og annars tónleik sum hevur givið honum íblástur. Undir tiltakin fer Kafé Leikalund at bjóða leskiligt ábit.